## Tryggjar fjølbroyttan flota

Eins og føroyingar eru grønlendingar væl nøgdir við fiskiveiðisáttmálan landanna millum fyri 2008, sum partarnir samdust um í Keymannahavn seinasta fríggjadag. Sáttmálin gevur grønlendskum skipumm loyvi at fiska 4.000 tons av norðhavssild og 350 tons av botnfiski í føroyskum sjógvi. Grønlendsku samráðingarmenninir siga, at sáttmálin við Føroyar hevur stóran týdning og er við til at tryggja ein fjølbroyttan fiskiflota.



## Seismikkur órógvar

Norskir fiskimenn vilja nú hava oljufeløgini at steðga øllum seismiskum royndum á teimum norðaru oljuleiðunum, nú toskurin er á veg úr Barentshavinum til leiðirnar fram við strondini, har hann skal gýta. Norska fiskimannafelagið vísir á, at í reglunum, sum Stórtingið hevur ásett um oljuleiting í Barentshavinum, verður beinleiðis sagt, at feløg, sum gera seismiskar royndir, skulu vísa serligt varsemi, tá toskurin fer inn ímóti landi at gýta.

*Reidar Nilsen er formaður í norska fiskimannafelagnum*

*(Mynd: Tidens Krav)*

# Viberg úr Trongisvági í el

**Hin 61 ára gamli Viberg Sørensen úr Trongisvági er nývaldur formaður í Føroya Reiðarafelag. Hann skal lyfta arvin eftir formannin seinastu mongu árini, Jákup Sólstein. Fyrsta uppgávan hjá formanninum verður at fáa í lag nýggjan sáttmála millum reiðarar og fiskimenn. Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, segði í Sosialinum í gjár, at her verður eingin "góða mamma"**



**PRÁT**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggi formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen úr Trongisvági, er 61 ára gamal. Konan eitur Jóna, og tey eiga trý børn. Anita er dóttirin, og tað er henni, garnaskipið hjá Vibergi er uppkallað eftir. Synirnir eru tveir, annar førir Anitu og hin siglir úti.

Viberg hevur í nógv ár sitið í nevndini í Føroya Reiðarafelag, og hann hevur eisini sitið sum næstformaður í fleiri ár við Jákupi Sólstein sum formanni.

Á fundi mánamorgunin skipaði nývalda nevndin seg, og nú verður tað Viberg, sum kemur at lyfta arvin eftir Jákup.

Næstformaður er Jónsvein Knudsen, sum eftir eykaaðalfundin umboðar ísfiskatrolararnar. Hóast nevndarlimirnir í felagnum eru skotnir upp av ymisku skipabólkunum, umboða teir sjálvandi alt felagið inneftir og úteftir.

Viberg er soleiðis eingin ársungi innan felagsarbeiði, og fyrsta uppgávan hjá nýggja formanninum eru samráðingarnar millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag um nýggjan sáttmála.

### Langt er ímillum

Seinnapartin í dag verður nýggjur fundur millum feløgini, og hesin verður í høllunum hjá Føroya Reiðarafelag.

Higartil hava samráðingarnar gingið trekt, og Føroya Fiskimannafelag hevur serliga lagt seg eftir at fáa meira upp á eftirlønina. Hinvegin halda reiðararnir, at oljuútreiðslurnar eru vorðnar so tyngjandi, at neyðugt er at taka hædd fyri hesum í samráðingunum.

Langt er millum partarnar.

Semingsmenn eru komnir upp í trætuna, men fundurin í dag er millum partarnar sjálvar.

- Semingsmenninir vilja sjálvandi halda seg burtur, so leingi partarnir tosa saman.

Spurdur, um semingsmenninir í hesum førinum ikki komu rættiliga tíðliga upp í trætuna, ásannar nýggi formaðurin, at tað komu teir.

- Jú, eg haldi, at teir vórðu boðsendir fyrr, enn vit hildu vera neyðugt.

Hann sigur, at tað var Føroya Fiskimannafelag sum boðsendi semingsmonnunum.

### Ikki fulltíðarstarv

Álitisstarvið sum formaður í Føroya Reiðarafelag er ikki fulltíðarstarv, minni enn so. Hetta líkist meira einum óløntum starvi.

- Tú fært eina lítla samsýning fyri at vera formaður, men hetta er einki livibreyð, sigur Viberg.

Hann vísir á, at tað er skrivari felagsins, Ólavur Jøkladal, sum hevur dagligu umsitingina av felagnum um hendi, og hann er einsamallur á skrivstovuni um dagarnar.

Tá ið vit ringdu til nývalda formannin stutt eftir klokkan 08 í morgun, spurdu vit, um vit nú høvdu vakt hann:

- Vakt meg? Nei, tað er so eiðasørt. Man missir svøvnin av hesum, sigur hann skemtandi.

Viberg er kendur sum skilamaður, og hann er blíður og fyrikomandi.

- Eg rokni við, at hetta er eitt starv, sum fáir hava sæð fram til at átaka sær beint í løtuni, nú samráðingar eru millum feløgini. Føroya Fiskimannafelag hevur fingið nýggjan formann, og tað hava vit eisini. Teir, sum undan fóru, høvdu verið leingi í hesi "bransjuni" og vistu, hvørjum roknast kundi við. Kortini var ikki lætt at finna semjur, men oftast – fyri ikki at siga hvørja ferð - vunnu vit á mál. Hvussu verður nú, veit eingin, leggur hann aftrat.

### Hevur góða tíð

Nývaldi formaðurin heldur,